Landssjúkrahúsið




# Isolatión á sjúkrahúsinum eftir innleggjan á útlendskum sjúkrahúsi

## Isolatión á sjúkrahúsinum eftir innleggjan á útlendskum sjúkrahúsi

Tú ert í isolatión, tí tú hevur verið innlagdur/innløgd á einum útlendskum sjúkrahúsi.



Hetta kann hava við sær, at tú ber bakteriur á tær, sum eru mótstøðuførar yvirfyri antibiotika.

Hesar bakteriur kunnu berast víðari og smitta bæði sjúklingar og starvsfólk.

Endamálið við isolatión og smittufyribyrgjandi tiltøkum er at minka um smittubreiðslu.

So skjótt sum vandin fyri smittu er av, skalt tú ikki vera í isolatión longur.

At vera í isolatión merkir, at tú liggur á einastovu við egnum baðirúmi, sum einans tú kanst nýta.

Í samráð við starvsfólkið verður avgjørt, nær tú aftur kanst fara út úr stovuni.

## Smittufyribyrgjandi tiltøk

Tá starvsfólkið skal hjálpa tær við ymiskum, bera tey svintu, handskar og møguliga munnbind og brillur; hetta fyri at minka um vandan at bera smittuna víðari.

## Hondreinføri

Fyri at minka um smittubreiðslu, er tað av alstórum týdningi, at tú hevur gott hondreinføri. Røktarfólkið vegleiðir teg í hesum.

## Vitjandi

Vitjandi skulu seta seg í samband við starvsfólkið, áðrenn farið verður inn í stovuna.
Vitjandi skulu ikki nýta vernd, uttan so at tey eru við í røktini.
Vitjandi skulu ikki vitja aðrar sjúklingar sama dag, sum tey vitja sjúkling, ið er í isolatión.
Vitjandi skulu vaska og spritta hendurnar, tá ið tey fara úr stovuni. Røktarfólkið vegleiða tey í hesum.

## Ráð og vitan

Ert tú í iva ella tørvar tær meir vitan um smittuvandan, set teg so í samband við starvsfólkið á deildini.

Landssjúkrahúsið

Kliniska eindin

tel 304500, www.ls.fo